# Amina Lawal fyri hægri rætt

**Sakin móti tí muslimsku kvinnuni Aminu Lawal, ið varð dømd at verða steinað til deyðis fyri at hava føtt eitt barn uttan fyri hjúnaband, skal fyri ein hægri rætt 27. august**

MANNARÆTTINDI
*Tíðindi frá Amnesty International*

Eftir at hoyringin av Aminu Lawal er útsett fleiri ferðir er tað staðfest, at sakin byrjar við ein hægri rætt 27. august 2003 í statinum Katsina norðarlaga í Nigeria, har hon býr. Væntandi verða Amina Lawal og sakførarar hennara til staðar. Sakin kann halda áfram, um allir dómararnir vera til staðar, so rætturin er viðtøkuførur.

Amnesty International fær enn skeivar áheitanir um, at avrættingin av Aminu Lawal er í nánd og at tað fer at henda 27. august ella fyrr, tað verður sagt at Amnesty er keldan til hesi tíðindi. Dómurin verður ikki framdur 27. august ella fyrr.

Amnesty International hevur tað fatan, at sakin hjá Aminu Lawal við hægri rætt og rætturin til at fáa verju er tryggjaður í løtuni. Hon verður ikki afturhildin og hevur ein góðan løgfrøðing. Hon fær stuðul frá einari samskipan av nigerianskum kvinnurørslum og mannarættindabólkum. Amnesty International hevur tætt samband við hesar felagsskapir.

»Tíverri er henda sakin útsett fleiri ferðir, so tey ið hava arbeitt fyri at broyta hennara dóm ikki skilja, hví ein kvinna og barn hennara verða viðfarin á henda hátt. Sakin er eitt greitt dømi um, at útseting er tað sama sum at burturbeina rættvísi«, sigur Stig Nielsen, tíðindastjóri í donsku deildini hjá Amnesty International.

**12. august 2003 – Meksiko:** Tíggju ár við harðskapi, morðum og kynsligum misbrúki skulu steðgast. Kvinnur, ofta ungar og fátækar uttan makt og ávirkan, liva í stórum vanda í meksikanska statinum Ciuadad Juárez og tað seinastu tíðina eisini í Chihuahua. Tey seinastu tíggju árini eru yvir 400 kvinnur horvnar í Ciuadad Juárez. 70 saknast enn. Tað, sum vanliga hendir er, at kvinnan verður fanga av rænaranum/rænarunum og verður fjald í fleiri dagar. Hon verður vanvird og verður kynsliga misnýtt á ein ræðuligan hátt, áðrenn hon verður myrd. Antin verður hon kvald ella meiðsla til deyðis. Líkið verður síðani tveitt burtur á eitt óbygt stað nær við býin.

Í frágreiðingini hjá Amnesty »Intolerable killlings, Ten years of abductions and murders in Ciuadad Juárez and Chihuahua«, sum varð løgd fram 11. august í Meksiko, verður harðliga funnist at yvirvaldinum fyri at gera ov lítið fyri at kanna ránini og morðini og fyri at gera ov lítið fyri at kvinnur kunnu vera tryggar har.

At myndugleikarnir ikki hava klárað at funnið útav, hvat er hent, er tað sama sum at teir hava góðtikið, tað sum hendir. Tað sáar eisini iva um, hvørt yvirvaldið klárar uppgávuna at umsita síni fínu lyfti um mannarættindi, sigur Irene Khan, aðalskrivari hjá Amnesty International, á einum tíðindafundi í Meksiko City.

Í frágreiðingini stendur, at áleið 370 kvinnur eru myrdar og av teimum eru minst 137 kynsliga misbrúktar. 75 lík eru ikki enn eyðmerkt. Amnesty hevur prógvað, at tað hevur ikki eydnast løgregluni at kanna og arbeiða víðari við týdningarmiklum upplýsingum, hvussu prógv verða gjørd og hvussu mistonkt verða pínd í fongslinum. Í øðrum førum hava líkuppskurðinir ikki verið nóg góðir og hetta hevur havt við sær, at familjurnar hava fingið skeiva ella mótsigandi kunning um lagnuna hjá døtrunum. Nógvar kvinnur fara til Ciuadad Juárez fyri at finna arbeiði á teimum útlendsku virkinum, ið eru stovnað í statinum fyri at fáa bíliga arbeiðsmegi. Virkini verða kalla maquiladores. Fyri nógvar kvinnur, ið fara til Ciuadad Juárez og Chihuahua fyri at skapa sær eitt betri lív, verður dreymurin til eina marru. Tað er vanvirðandi, at tað hava gingið tíggju ár og tað hevur ikki eydnast yvirvaldinum at steðga harðskapinum, sigur Irene Khan.

Amnesty sigur eisini, at tað sum hendir í statinum er at greitt dømi um, hvussu illa dómsvaldið riggar í landinum. Í frágreiðingini vísir Amnesty á tørvin á grundleggjandi broytingum, tá tað snýr seg um dómar og møguleikan at geva løgfrøðiligan stuðul til offur og rættvísa rættargongd til mistonkt. Í Meksiko skal Irene Khan møta umboð fyri fólkið og Vincente Fox forseta.



*Amina Lawal gevur átta mánaða gamla barninum, Wasila, bróst í Sharia dómstólinum í Bakori Funtua. Myndin er tikin 19. august í fjør. Amina Lawal var dømd at verða steinað til deyða eftir at verða funnin seg í at hava verið manninum ótrúgv. Nógvar altjóða atfinningar vóru venda móti Nigeria av hesum rættarmáli. Nýggja rættamálið byrjar 27. august*






# Skutaramenn framvegis í Mandal

**Ov høg alda í Kattegat forðaði Atla og Sveini at koma til Danmarkar. Teir væntaðu kanska at kunna sigla víðari fríggjakvøldið**

SKUTARAFERÐIN
*Eirikur Lindenskov*

Teir báðir skutaramenninir, Atli S. Petersen og Sveinur Høgnason, sum eru ávegis úr Føroyum til Danmarkar á vatnskutarum, vóru framvegis í Mandal í Suðurnoreg, tá vit hittu teir beint fyri middag í dag, fríggjadag.

– Aldurnar eru framvegis ov høgar í Kattegat. Tær hava verið upp í fimm metrar, og tað er alt ov nógv, segði Atli S. Petersen.

Hann sigur, at teir fara ongan veg fyrr enn aldan er niðan fyri hálvan annan metur.

– Men tær eru avtakandi, so vit vænta kanska at kunna fara avstað seinni í kvøld.

Tá teir eru komnir teir umleið 60 fjórðingarnar um Kattegat, hava teir einar 200 fjórðingar eftir sigla í Danmark. Úr Mandal leggja teir leiðina til Hanstholm, síðani gjøgnum Limfjørðin, síðani kós móti Norðursælandi og til Keypmannahavnar, har teir leggja at á Lange Linje.

Atli S. Petersen veit ikki rættuliga at siga, hvussu nógv verður gjørt burtur úr, tá teir koma á Lange Linje, men teir hava so fingið boð frá umboðsmanni teirra í Keypmannahavn um at siga frá tveir tímar áðrenn.




*Hetta er leiðin, teir báðir hava sigt úr Stavanger til Mandal í Suðurnoreg. Tað eru um 60 fjórðingar tvørtur um Kattegat til Hanstholm, og síðani eru umleið 200 fjórðingar hjá teimum eftir at sigla til Keypmannahavnar*

# Sámal spennir streingirnar




**Út er komin fløga við violintónleiki, har ein hin fremsti violinleikarin í landinum vísir kynstur síni. Føroysk upprunaverk eru a skránni og eisini kenda ævintýrið um tarvin Ferdinand**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Út er konin fløga við violintónum, ið eru uppruna føroyskir. Tað er Sámal Petersen, sum hevur verið í upptøkuhølunum.

Sámal er utbúgvin tónleikari við violinini sum høvuðsljóðføri, og telist hann millum tey fremstu í landinum innan violinspæl. Hann er útbúgvin við Carl Nielsen Konservatoriið í Danmark og fór so til Wien at útúgva seg víðari. Sámal Petersen er konsertmeistari í Føroya Symfoniorkestri og limur í føroysku tónleikasamtøkunum Aldubáran og Musica Viva.

Sámal undirvísir í violinspæli og við sær á fløguni hevur hann til eina violinduo hin unga og evnaríka Jón Festirstein, ið er 17 ára gamal, men sum longu hevur víst framúr violinspæl og sum eisini spælir í Føroya Symfoniorkestri.

Páll Danielsen er útbúgvin sjónleikari við leikskúlan í Århus og starvaðist síðani í seks ár við leikhúsið í Århus.Kom aftur til Føroya í 1998 og hevur verið við Grímu og arbeitt í Sjónvarpi Føroya. Hann lesur á fløguni ævintýrið um Ferdinand, meðan violintónarnir leika undir.

Annars eru verkini á fløguni føroysk. Variatiónir við tema eftir Edvard Nyholm Debess, Duo fyri tvær violinir eftir Kára Bæk, Echoes of the past eftir Sunleif Rasmussen og Bøhmerlands Dronning eftir Kristian Blak.

Fløgan hevur heiti eftir verkinum hjá Sunleif Rasmussen, Echoes of the past.

Fløgan er tikin upp í Útvarpi Føroya og Finnur Hansen var tøkningur. Sámal Petersen var freimleiðslustjóri og Ole Wich gjørdi fløguhúsan. Tutl gevur fløguna út.

